

# Vitjaðu høvuðsbjargingarstøðina á Sola

**Jógvan Hugo Gardar**

27.08.2014 - 09:29

Oljan.fo

Seinnapartin í gjár vóru umboð fyri Runavíkar og Tórshavnar kommunu á vitjan á høvuðsbjargingarstøðini hjá Noregi, ið liggur á Sola, uttanfyri Stavanger. Tey eru í Stavanger í samband við oljustevnuna ONS.

Tað var Grete Kvalheim, serráðgevi á Hovedredningssentralen við flogvøllin á Sola uttanfyri Stavanger, sum stóð fyri fundinum um tilbúgving, bjarging og næstraumsorgan.

Bjargingarleiðarin Ola Vaage vísti runt og helt fyrilestur um tilbúgving og bjarging í norðurøkjunum. Grete Kvalheim, sum er serráðgevi í psykososialari tilbúgving, helt sjálv fyrilestur um næstraumsorgan, og um hvussu farið verður um avvarðandi í kreppustøðum, og tá vanlukkur henda.

Starvsfólkið á bjargingarmiðstøðini skal bæði taka ímóti bjargaðum og burturfluttum frá neyðstøðum, og taka sær av praktiskari upplýsing og mentalum stuðuli til avvarðandi. Ofta verður tað næstraumsorganin, sum er besta parametur fyri, um miðstøðin megnar sína uppgávu til fulnar.